

## Stórar nøgdir fyri lítlan prís

Í gjár seldi Fiskamarknaður Føroya sløk 600 tons á uppboði. Hetta er ein munandi størri nøgd enn tað, vit síggja ein vanligan søludag á fiskamarknaðinum. Sølan fyri hesi 600 tonsini gav tilsamans góðar 6,4 miljónir krónur. Av hesum 600 tonsunum, vóru 185 tons av toski, 132 tons av hýsu, 112 tons av longu og 80 tons av brosmu. Sløk 80 tons vóru av toski 4, sum fekk miðalprísin 9,02 krónur fyri kilo. Hýsa hevði sera lágan prís á marknaðinum í gjár, og besti miðalprísurin fyri hýsu var einans 8,71 krónur fyri kilo, sum var fyri bestu hýsustøddina. Besti miðalprísur fyri longu var 11, 98 krónur fyri kilo, og besti miðalprísurin á brosmu var 8,98 krónur fyri kilo. Sum heild vóru fiskaprísirnir lágir á marknaðinum í gjár, og miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt var 10, 86 krónur fyri kilo.

# Ódemokratiskur fiskivinnureformur

**Óli M. Lassen, línuskipareiðari, heldur, at tað, sum landsstýrið nú arbeiðir við, og sum rópt verður ein nýggjur fiskivinnureformur, verður eitt áhaldandi politiskt álop á okkara feskfiskaflota. - Teir samlaðu karmarnir at virka undir eru út av lagi vánaligir og havandi í huga, at talan er um gomul skip og ein útróðrarflota, sum er við at doyggja út, er tað púra óskiljandi, at lagt verður eftir fiskimanninum og heimaflotanum, sigur hann**



*- Skipini, sum veiða botnfisk, hava nógvar avmarkingar. Tey skulu hava føroyska manning, landa tveir triðingar av veiðini í Føroyum, og tey kunnu ikki framleiða umborð. Hýsan skal landast í Føroyum, sjálvt um virkini siga seg ikki kunna selja hesa vøru á enska marknaðinum, sigur Óli M. Lassen, línuskipareiðari*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIVINNU-POLITIKKUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Óli M. Lassen, línuskipareiðari, er ivingarsamur um seminarið, sum løgmaður og figgjarmálaráðharrin saman við landsstýrinum hava hildið á Gjáargarði í gjár og í dag.

Hann sigur, at løgmaður og figgjarmálaráðharrin áhaldandi tosa um ein fiskivinnureform, men skal talan verða um ein reform, so má hetta eftir hansara tykki eisini merkja, at ætlanin veruliga er at menna eina skipan við at gera ítøkiligar bygnaðarbroytingar.

- Vinnan kennir einki til hetta. Hon er ikki kunnað um hetta og hevur heldur ikki verið við í eini tilgongd at gera ein fiskivinnureform, sigur línuskipareiðarin.

Óli M. Lassen vísir á, at løgmaður í fjølmiðlunum hevur sagt, at hallið á figgjarlógini kann fáast munandi niður við at avtaka minstulønina og sjómannafrádráttin.

- Og nú byrja figgjarmálaráðharrin og løgmaður aftur at tosa um tilfeingisgjald á fiskivinnuna. Vit kenna útgangsstøðið. Her er als ikki talan um bygnaðarbroytingar, men einans um at fáa fleiri pengar til landskassan, sum fiskimenn og reiðarar skulu gjalda.

### Gamal floti

- vánaligt lønsemi

Óli M. Lassen vísir á, at tá talan er um botnfiskaflotan og serliga línu- og útróðrarflotan, er talan um ein sera gamlan flota, har fleiri skip eru millum 40 til 60 ára gomul.

- Grannskoðarafyritøkan Rasmussen & Weihe, sum nú kallast NOTA, hevur gjøgnum fleiri ár greinað raksturin hjá flotanum, og eru teir hvørt ár komnir til somu niðurstøðu; at føroyski feskfiskaflotin hevur eitt sera lágt lønsemið í mun til flest allar aðrar vinnur í Føroyum.

Reiðarin vísir á, at skipini, sum veiða botnfisk, hava fleiri avmarkingar við tað, at tey skulu hava føroyska manning, landa tveir triðingar av veiðini í Føroyum, og tey kunnu ikki framleiða umborð. Av somu orsøk eru hesi skip noydd til at uppihalda ein infrastruktur í Føroyum við kassamiðstøð og sølustøðum og øðrum, ið alt hevur sín prís.

- Sum flestum kunnugt skal hýsan landast í Føroyum, sjálvt um virkini siga seg ikki kunna selja hesa vøru á enska marknaðinum, leggur hann aftrat.

### Skerdir fiskidagar

Línuskipareiðarin vísir á, at umframt nógvar reguleringar, er tað ein ótti á hvørjum ári, tá fiskidagar áhaldandi verða skerdir.

- Henda skilaleysa árliga skerjing er íkomin orsaka av einari politiskari avgerð frá 1996, sum tó fleiri vóru samd um, men sum politikkararnir ikki hava havt rygg til at rættað aftur. Teir samlaðu karmarnir hjá vinnuni at virka undir eru út av lagi vánaligir og havandi í huga, at talan er um gomul skip og ein útróðrarflota, ið er við at doyggja út, er tað púra óskiljandi, at lagt verður eftir fiskimanninum og heimaflotanum, sigur Óli M. Lassen.

### Eingin stuðul

Hann vísir á, at stórur partur av vesturlendska búskapinum er uppbygdur við ymsum stuðulsskipanum, har eitt nú ES hevur sera nógvan landbúnaðar- og fiskivinnustuðul.

- Innan shipping hevur man FAS og DIS og aðrar skipanir, men í Føroyum ynskir man at avtaka allan stuðul og leggja serligt avgjald á fiskiflotan, meðan alt annað verður stuðlað í høvd og reyv.

Reiðarin sigur, at línu- og húkaflotin søkti um 14 miljónir krónur í kreppuhjálp í eitt ár (2009), men hevur enn ikki fingið svar. Samstundis verða veittar 10-tals miljónir krónur til ymiska gransking í Føroyum - ja eisini til gransking í veganøvnum, sum hann vísir á.

### Ítøkiligt svar

Reiðarin spyr, um løgmaður og figgjarmálaráðharrin kunnu greiða vinnuni og Føroya fólki frá, hví serligt avgjald skal leggjast á 40-60 ára gomul skip, og hví gjørdar avtalur við vinnuna, sum eru innbygdar í hýrusáttmálarnar, bara skulu skúgvast til viks á einum seminar í Gjógv.

- Hvørjir eru teir ráðgevarar, ið kunna tykkum um, at vit kunnu fiska og framleiða fisk í Føroyum við okkara kostnaðarstøði, tá øll lond kring okkum veita stuðul til landbúnað og fiskivinnuna?

Óli M. Lassen spyr eisini, um tað ikki er rætt, tá grannskoðarar áhaldandi vísa á, at lønsemið hjá feskfiskaflotanum er sera vánaligt.

Reiðarin heldur, at betri hevði verið um løgmaður, fíggjarmálaráðharrin og fiskimálaráðharrin settu seg niður við vinnuni og viðgjørdu, hvussu vit kunnu endurnýggja heimaflotan.

- Eg haldi eisini, at teir parttíðar- og fultriknir útróðrarbátar, ið eftir eru, eiga at fáa góðar karmar at virka undir, sigur hann.

### Ódemokratiskt

Óli M. Lassen heldur, at tað, sum landsstýrið nú arbeiðir við, er sera ódemokratiskt og røkkur langt inn á arbeiðsmarknaðarviðurskiftini – uttan, at partarnir í fiskivinnuni verða spurdir um nakað sum helst.

- Nei, her er ikki talan um ein reform, men bert um at fáa fleiri krónur til framhaldandi øktan almennan rakstur, heldur línuskipareiðarin.



*- Vinnan kennir til, at arbeitt verður við nøkrum fiskivinnureformi. Hon er ikki kunnað um hetta og hevur heldur ikki verið við í eini tilgongd at gera ein slíkan reform, sigur Óli M. Lassen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*